## DAGSINS MEINING

# Havnin skal nokk fáa sítt

Í vikuni stóð greitt, at Fótbóltssambandið loksins hevur tikið avgerð um, hvørjari verkætlan um fótbóltshøll tey hava gjørt av at stuðla.

Hvørt tað er rætt, at høllin verður í Skálafirði heldur enn á Svangaskarði, skulu vit ikki taka dagar ímillum. Men tikna støðan hevur tó eisini sínar fyrimunir við sær. Ikki minst tað, at Føroyar framvegis koma at hava tveir altjóða góðkendar leikvøllir. Og at vit á tann hátt í nógv størri mun kunnu standa fyri trýstinum og slitinum, sum er á grasundirlagið, tá fleiri altjóða uppgávur koma tætt at hvørjari aðrari.

Men tað kanska mest týdningarmikla í hesum er, at Føroyar fáa eina fótbóltshøll uttan fyri høvuðsstaðin sum skjótast. Líka mikið hvørt stórsligna ætlanin við Stórutjørn verður veruleiki ella ikki.

Fyri føroyskan fótbólt hevur tað alstóran týdning, at umstøðurnar venja og mennast verða so góðar, sum tað á nakran hátt ber til. Eisini um veturin. Og hetta setir stór krøv til teir venjingarfasilitetir, sum skulu vera tøkir. Í longdini er spurningurin helst, hvørt tað er nóg mikið við einari høll, og tann trupulleikin veðrur nú beindur av vegnum mest sum alt fyri eitt.

Var støðan tann, at FSF hevði valt at leggja stuðulsmilliónirnar frá altjóða fótbóltinum í høvuðsstaðin, vildi tað nærum við vissu merkt, at eingin høll kom aðra staðni í landinum fyrstu mongu árini. Og støðan hevði eisini verið tann sama, um atlit vórðu tikin til eitt nú Stórutjørn, og at niðurstøðan um tørvin á enn einari høll tí hevði verið neilig.

Høvuðsstaðurin skal uttan iva fáa sína høll innan alt ov nógv ár. Líka mikið, um Stóratjørn verður veruleiki ella ikki. Fólkagrundarlagið og stóri aktiviteturin í miðstaðarøkinum hevði fyrr ella seinni viðført, at farið varð undir slíka byggiætlank meðan sama sjálvfylgja als ikki er galdandi fyri útjaðaran.

Nú er so bert at vóna, at allir formalitetir til ætlanina í Skálafirði verða fingnir í rættlag til ásettu tíðina. Fyri føroyskan fótbólt – og fyri menningina av økjum uttan fyri høvuðsstaðin sum heild – vil ein slík høll fáa ovurstóran týdning. Bæði ítróttarliga, mentanarliga og sosialt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kunningarskriv frá Sandskommunu

**LEIF W. K. MORTENSEN,**
Sandi

Herfyri kom kunningarskriv út í hvørt hús í Sands kommunu. Her verður m.a. greitt frá, at aftursvar er sent løgtingsins umboðsmanni, viðvíkandi kæru frá starvsmannafelagnum í samband við uppsøgnina av skrivaranum. Tó er eftur ynski bygdarárðslimi mannandi meirlutan, punkt 4 strikað úr aftursvarinum. Her standi eg spyrjandi, hvat er punkt 4 og hvar er aftursvarið. Hvat er meiningin við at senda út til borgaran at punkt 4 er strikað, og ikki upplýsa hvat tað er.

Eitt annað kunningarskriv, ið var sent í hvørt hús, hevði viðfest aftursvar frá meirilutanum, viðvíkjandi kæru frá minnilutanum. Men her manglaði at greiða frá hvat klagan snúði seg um. Ístaðin fekk mann ein heilan brokkmanns lestur, ið millum annað vavdist uppi í familju viðurskiftum hjá minnilutanum, og øðrum tílíkum smáborgarligum.

Kort um greitt má sigast, at antin dugir umsiting Sands kommunu ikki at gera sítt arbeiði, ella finst eingin greið linja fyri hvat skal standa í hesum vælsignaðu kunningarskrivum.

Tað sum eg haldi verða sera óhunaligt, er at vita at tann møguleikin er til staðar, at meirlutin kann missnýta hesi kunningar skriv til sín egna fyrimun.

Tað hevði verið uppá sítt pláss, at sent út til borgaran hvat punkt 4 og aftursvarið snúði seg um, og kæruna frá minnilutanum, og at leggja eina greiða linju framyvur, hvat skal og ikki skal standa í kunningarskrivunum. Hetta hevði so havt við sær, at kunningarskrivini ikki sóu út sum vóru tey eitt propaganda amboð hjá meiriluta Sandskommunu.

# Staddur í málsliga, landafrøðiliga meldrinum …

**HERI SIMONSEN**



Sum ein vanligur meinigur føroyingur er ein ikki sørt ørkymlaður, um hvørt ein skal skriva lond við ”AI” ella ”EI”. UkrAIna ella UkrEIna. Vit fáa neyvan ukr..nska landsliðsvenjaran at leggja høvdið á Blokhin hvørt vit skulu skriva: UkrAIna ella UkrEIna. Onkur verjir ”Borg” fyri ”EI”, meðan annar letur ”Ivan” koma ”AI” til góðar. Tí er tað, at eg sum ein meinigur maður spyrji hesar málkønu menn: eiga vit føroyingar so at stava vietnamesiska høvuðsstaðin: HANOY, og ikki HANOI?

Vit úttala jú býin: ”HANOY”. Nú broytti fyrrverandi suðurvietnamesiski høvuðsstaðurin navn til HO CHI MINH BÝURIN í 1975. So vit føroyingar sleppa undan at klandrast um hesin skal skrivast: SAIGON ella SEIGON. Og hvussu er við indiska stórbýnum BOMBAY, á føroyskum má býurin væl stavast: BOMMBEY‹.

CAPEVERDEOYGGJARNAR eita GRØNHØVDAOYGGJARNAR á føroyskum. Eitur oyggjin REUNION har føroyskur skipari var fastur í langa tíð so: AFTURHITTINGAR-SAMVERA á føroyskum?? Spennandi verður at vita hvussu leikur fer fram í KANUGAR‹I, sum KIEV eigur at eita á føroyskum, ella? Og tá Italia leikar á Tórsvølli ímóti Føroyum, verður tað italska ríkissjónvarpsstøðin RAI, ella REI sum sendir frá dystinum??

# Ukreinsk málrøkt 2: Ukreina á føroyskum!

**EYÐUN Á BORG**
Lærari



Takk fyri viðmerkingarnar, Johnny, Ivan og Róðin! Hugaligt!

Forkunnugt at lesa tað, sum kønur og serkønur í russiskum hava at siga um málfrøðiliga upprunan viðvíkjandi landsnavninum, Ukreina.

Sum eg skilji á teimum russiskkønu, so er úttalan tann sama á russiskum/ukreinskum, sum hon er á føroyskum. Tað er jú frálíkt, men so er munurin bara tann, at útlendska ai verður ei á føroyskum! Í Føroyum laga vit jú landanøvn eftir føroyskari tungu og føroyskum bókstavum.

Svenskarar, til dømis, siga /skriva Sverige, og týskarar siga/skriva Deutschland. Kortini siga/skriva vit sjálvandi Svøríki og Týskland í Føroyum!

Altso: Ukreina í Føroyum, tí útlendskt ai verður skrivað ei á føroyskum! So sera einfalt, sum Róðin eisini skrivar.

Tí skriva vit eisini Teiland og Maleisia, men tað er sjálvandi eisini gott at duga at skriva Thailand, sum gjørt verður á útlendskum máli.

Við landsmálkvøðu.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.